UTTAN ÚR HEIMI

## Noreg og Russland forða trygdarkravi

Ein ætlan hjá londunum við Eystrasalt at banna tangaskipum við einkultum skrokki at sigla í Eystrasalti er farin fyri bakka í fyrsta umfari, tí Noreg og Russland vildu ikki taka undir við henni.

Myndugleikarnir í Oslo og Moskva halda ikki, at tað er rætt av londunum við Eystrasalt at taka eitt tílíkt stig, men at eitt tílíkt forboð heldur eigur at koma frá ST. Talsmaðurin hjá norska uttanríkisráðnum, Karsten Klepsvik, segði í gjár, at tað er umráðandi at hava felags reglur allastaðni í heiminum, tí reglur, sum bara umfata ávís øki, kunnu misnýtast sum eitt slag av handilsforðingum. Tí halda norðmenn og russar, at altjóða sjóvinnustovnurin IMO eigur at taka sær av málinum, og at eitt uppskot um nýggjar trygdarreglur eigur at koma haðani.

Danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, sigur, at londini við Eystrasalt ætlaðu at vera undangongulond á hesum økinum, men at hetta fyribils verður av ongum.

## Børnini doyggja

Á einari ráðstevnu í zimbabwiska høvuðsstaðnum Harare í vikuni kom fram, at nógv børn í Zimbabwe eru í sera stórum vanda fyri at fáa eyðkvæmi.

Landsins heilsumálaráðharri, David Parienyatwa, segði á ráðstevnuni, at umleið 2,3 milliónir fólk í landinum eru smittað við eyðkvæmi, men at 90 prosent av teimum vita ikki, at tey eru smittað. Hann segði, at ungar gentur eru í serliga stórum vanda fyri at fáa smittuna, tí gamlir mentanarligir siðir gera, at genturnar ofta verða noyddar at gifta seg blaðungar.

David Parienyatwa segði, at um tvey ár verða ein millión foreldraleys børn í Zimbabwe orsakað av eyðkvæmi. Sum er hava 780.000 børn mist mammuna av sjúkuni, og 240.000 børn eru skrásett sum smittað. Umleið 2.000 fólk doyggja av eyðkvæmi í Zimbabwe um vikuna.

## Funnið upphav menniskjunnar

Í 1997 funnu vísindafólk beinagrindirnar av tveimum vaksnum fólkum og einum barni í Etiopia, og kanningar vísa nú, at beinagrindirnar eru millum 154.000 og 160.000 ára gamlar. Tær elstu beinagrindirnar av fólki, sum vóru funnar frammanundan, vóru umleið 50.000 ár yngri.

Vísindafólkini siga, at tær seinastu kanningarnar stuðla ástøðið um, at mannaættarinnar vøgga stóð í Afrika, samstundis sum kanningarnar avsanna gomlu gitingarnar um, at vit stava frá teimum duldarfullu neandertalunum.

Tað eru tó ikki øll vísindafólk, sum halda, at okkara elstu forfedrar livdu í Afrika. Hesi halda fast um, at vit stava frá neandertalunum í Evropa, sum høvdu sín uppruna fyri umleið 400.000 árum síðani, og sum doyðu út fyri 30.000 árum síðani.

## Brúðurin rýmdi

Løgreglan í Kina leitar eftir níggju kvinnum, sum rýmdu frá monnunum minni enn tveir mánaðir eftir, at tær høvdu játtað at liva saman við teimum alt lívið.

Teir níggju brúðgómarnir høvdu í felag goldið 170.000 krónur fyri at fáa hvør sína konu, men hjúnarløgini høvdu ikki vart meiri enn nakrar vikur, tá allar brúðrarnar brádliga hvurvu sum døgg fyri sól.

Eitt er, at teir níggju menninir hava mist konurnar. Teir sita eisini eftir við rokningini fyri felags brúdleypið, sum teir hildu við læntum pengum.

# Sharon bjóðar Bush av



*Palestinar bera ein særdan mann burtur eftir eitt ísraelskt tyrluálop í Gaza. Minst trý fólk doyðu í álopinum, og fleiri tíggjutals vórðu særd*

**Ísraelski forsætisráðharrin leggur lítið í tað, sum George W. Bush, forseti, og palestinski forsætisráðharrin, Mahmoud Abbas, siga um frið í hesum døgum. Men einans Bush kann forða einum veruligum blóðbaði í Miðeystri.**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*

Ísrael og palestinski felagsskapurin Hamas hava sent hvør øðrum krígsavbjóðing. Ísrael sigur, at tað fer at leggja Hamas í oyði. Grundgevingin er, at tá teir palestinsku myndugleikarnir ikki vilja gera tað, noyðist Ísrael at taka stigið.

Embætismenn hjá ísraelsku stjórnini hava latið leka út, at Ariel Sharon á einum stjórnarfundi í vikuni kallaði teir palestinsku leiðararnar nakrar ræðuskítar, sum ikki vilja stríðast ímóti yvirgangi, men sum eru skjótir at gera vart við seg, tá ísraelsmenn leypa á. Á sama fundinum skal Sharon hava kallað palestinska forsætisráðharran, Mahmoud Abbas, ein høsnarunga, sum ikki hevur fingið fjaðrar enn.

Eygleiðarar í Miðeystri siga, at við at senda Hamas krígsavbjóðing hevur Sharon valt at eyðmýkja bæði Bush og Abbas. Bush hevur fleiri ferðir biðið Sharon steðga tiltøkum, sum kunnu eggja palestinum til at gera móttiltøk, men seinastu dagarnar hava Sharon ikki lurtað eftir hesum áheitanunum.

Eygleiðararnir í Miðeystri siga, at ísraelska krígsavbjóðingin til Hamas fera uttan iva at fáa uppaftur fleiri palestinar til at venda sær ímóti Ísrael, og hóast ísraelski herurin er tann sterkasti í Miðeystri, er tað ógjørligt at meta um, hvørjar avleiðingar ein tílík avbjóðing kann fáa.

Seinastu dagarnar hevur Bush tosað fyri deyvum oyrum í Jerusalem, men hann er kortini tann einasti, sum kann forða fyri, at tær báðar krígsavbjóðingarnar enda í einum blóðbaði, siga eygleiðararnir.

# CIA visti at Bush leyg

**Amerikanska fregnartænastan visti, at einki hald var í tí, sum George W. Bush, forseti, segði um kjarnorkuvápnaætlanina hjá Saddam Hussein.**

USA
*Árni Joensen*

Tað var í einari røðu fyri amerikansku tjóðini tann 28. januar, at George W. Bush, forseti, segði, at Irak var í ferð við at gera eina kjarnorkubumbu, og at Saddam Hussein hevði roynt at keypa ríkað uran úr afrikanska landinum Niger.

Fregnartænastuupplýsingarnar, sum Bush nýtti í røðuni, fingu fleiri amerikanarar at taka undir við ætlan forsetans um at fara í kríggj við Irak, men nú vísir tað seg, at upplýsingarnar vóru ósannar.

Washington Post skrivaði fyrradagin, at áðrenn forsetin helt ta týdningarmiklu røðuna, visti fregnartænastan CIA, at upplýsingarnar um, at Irak hevði roynt at keypa ríkað uran úr Niger, vóru ósannar. Men CIA kunnaði ongantíð Hvítu Húsini um tað.

Washington Post og aðrir amerikanskir fjølmiðlar siga, at hetta styrkir illgrunan um, at CIA gekk ørindi fyri forsetan, og at Hvítu Húsini bara fingu tær upplýsingarnar, sum tæntu krígsætlan forsetans.

Samstundis hava amerikanskir og bretskir fjølmiðlar avdúkað, at bæði Bush og Tony Blair nýttu sínar politisku vøddar til at fáa fregnartænasturnar at skriva frágreiðingar, sum gjørdu alt ov nógv burtur úr vápnunum hjá Irak.

Í Bretlandi skulu hesi viðurskiftini kannast, men tað hendir neyvan í USA. Mikudagin eydnaðist tað floksfeløgunum hjá Bush í Kongressini at steðga einari tilsvarandi kanning har. Tað hevur øst demokratisku andstøðuna, sum leggur forsetan og stjórnina undir at hava falsað upplýsingar um iraksku vápnini.

ítróttur
Nr. 110 • leygardagur • 14. juni 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Stórt føroyskt ferðalag til Írlands



*Føroyska ferðalagið fer longu mánadagin til Írlands, har seinastu fyrireikingarnar til Special Olympics fara fram í norðuríska býinum Carrickfergus*

**Á Special Olympics World Summer Games fara 10 føroysk ítróttafólk at kappast í fýra ymsum greinum**

SPECIAL-OLYMPICS
*Jákup Mørk*

Tað verður ikki eiti á upplivning hjá teimum 10 føroysku luttakarunum, sum í næstum fara Írlands. Special Olympics er olympiadan hjá teimum menningartarnaðu, og her verður so sanniliga eisini gjørt nógv burturúr.

Eingin minni enn Nelson Mandela verður maðurin, sum setir kappingina, og á eftirfylgjandi undirhaldinum verður U2 høvuðsnavnið í Croke Park í Dublin.

Kappingin fer fram í døgunum 21. til 29. juni, men longu mánadagin komandi fer føroyska liðið til Írlands, har tey í fyrsta umfari verða í Carrickfergus, har tey bæði koma at hava venjingar, umframt at tey eisini fáa høvi at líta seg eitt sindur íkring á grønu oynni.

Tilsamans verða ikki 7.000 ítróttarfólk, 3.000 venjarar og ikki færri enn 40.000 sjálvboðin hjálparfólk við á leikunum, og millum øll hesi verður so eitt føroyskt ferðalag, har tíggju íðkarar umframt ferðaleiðarar.

Tey tíggju eru Meiken Olsen, Marjun Niklasdóttir, John Joensen, Tórur Hjalt Jacobsen, Unn Mortensen, Júst í Túni, Sidana Djurhuus, Elvin Weihe, Durita Strøm og Símun Petur Zachariasen, og fara tey at kappast í ávíkavist frælsum ítrótti, borðtennis, boccia og svimjing.

Einari Olympiadu so líkt, so verður talan eisini um stórslignan enda, og tá verður tað kendi bólkurin, Westlife, sum fer at seta sín dám á, meðan luttakararnir hvør í sínum lagi fyribils siga farvæl við tey vinarbond, sum altíð verða knýtt á knýtt á slíkum leikum.

Føroyska ferðalagið verður aftur í Føroyum 30 juni.

# Símun og Rigmor vunnu FM

**Símun Joensen úr Klaksvík vann týskvøldið 10 km kappingina, sum skipað varð fyri í Runavík**

RENNING
*Jákup Mørk*

Sum partur av eystanstevnuni var rennikapping fyri vaksin hildin týsdagin. Umframt at vera triðja umfar í Grand-Prix kappingini, var hetta eisini FM-kapping á teininum, so spenningurin var stórur undan kappingini. Ikki minst tí annars mest sum einaráðandi Hallur Holm ikki var við til kappingina hesaferð.

### Símun og Rigmor

Í alt luttøku 20 menn og 4 kvinnur, og hjá kvinnunum var tað ikki heilt óvæntað Rigmor N. Arge sum vann. Við tíðini 39,51 var hon enntá júst í somu tíð, sum føroyska metið á teininum.

Hjá monnunum varð tað Símun Joensen úr Klaksvík, sum í kapping við Sigurð Justinussen og Jonhard Larsen vann FM-heitið.

Avgerandi løtan kom hálvan annan kilometur frá málinum, tá Símun av álvara setti ferð á, og so vunnu hinir báðir ongan tíð upp á liðini á honum. Við tíðini 35,34 minuttum setti Símun eisini persónligt met á teininum, og einki er at ivast í, at her er talan um ein rennara, sum kann betra seg enn meira.

## Fyrsta FM-stevnan á Strondum

**46 bátsmanningar fara at kappróvga komandi vikuskifti, tá ið fjarðastevna verður hildin á Strondum. Nú fyrsta stevnan hevur verið, kann styrkismetingin nýtast til startirnar, og verður hendan soleiðis, at bátarnir, sum vóru fremstir á norðoyastevnu hesaferð byrja í miðjuni.**

**5-mannafør, dreingir**
01 Kollur
02 Royndin Fríða
03 Tjaldrið
04 Blikur
05 Sílið
06 Havfrúgvin
07 Fípan Fagra
08 Báran
09 Junkarin

**6-mannafør, kvinnur**
01 Fuglfirðingur
02 Smyril
03 Páll Fangi
04 Gongurólvur
05 Lómur
06 Fortuna

**5-mannafør, gentur**
01 Tjaldrið
02 Kollur
03 Ørnin
04 Sílið
05 Drekin
06 Blikur (1 gult kort)
07 Havfrúgvin
08 Firvaldur
09 Fípan Fagra
10 Junkarin
11 Hulda

**6-mannafør, menn**
01 Páll Fangi
02 Gongurólvur
03 Lómur
04 Jarnbardur
05 Smyril
06 Strálan
07 Sølmundur
08 Sundabáturin
09 Kollfirðingur

**Áttamannafør**
01 Toftabáturin
02 Knørrur
03 Argjabáturin
04 Ørvur
05 Kvívíkingur
06 Teistin
07 Gullbrandur

**Tíggjumannafør**
01 Vestmenningur
02 Eysturoyingur
03 Havnarbáturin
04 Nólsoyingurin
Somu bátar sum seinast.